# Býráðið

**Dagfesting:** 29.01.2026 kl. 19:00
**Málnr.:** 25/00008

Nevndarlimir: Dávur Juul, Ólavur Larsen, Eyðun á Lakjuni, Eivin Breiðaskarð, Sonni á Horni, Jóan Pauli Olsen, Jastrid á Dalbø, Ørvar Jacobsen, Kristian Martin Petersen

Varalimir:

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Jónhild Abrahamsen

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| 1/26 | 25/00105-15 | Eyka játtan til kirkjugarð |
| 2/26 | 25/00242-1 | Løgtingslóg um integratión - Hvat merkir hettar fyri Fuglafjarðar Kommunu |
| 3/26 | 25/00501-2 | Umsókn frá Vónini um útiøki til 200 bingjur |
| 4/26 | 25/00635-2 | Ískoyti til leigusáttmála fyri hølini hjá Barnaverndartænastuni |
| 5/26 | 26/00017-3 | Avtala um inntríningarrætt í avtaluna millum Fuglafjarðar kommunu og Ennibryggjuna |

1

**Til afgørelse**

## 1/26
## 25/00105-15 Eyka játtan til kirkjugarð

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 21.01.2026 | 3/26 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.01.2026 | 8/26 |
| 3 Býráðið | 29.01.2026 | 1/26 |

2

## Tilráðing

| Til viðgerðar í | Tekniskunevnd, fíggjarnevnd og Býráð |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Undir sáttmála samráðingum við arbeiðstakarna av umgraving av gamla kirkjugarðinum blivu ymiskar sparingar framdar. Hettar grunda á at ein metti at økið fekk tíð at seta seg soleiðis at tað var klárt tá ið vit skuldu taka hettar í brúk.<br>Eftir fyrru víðkan niðan móti Mirmansvegi í ein vestan, metti man at vit høvdu pláss til nøkur ár fram grunda á, at víðkaða økið kundi hava gravir, ið vóru dupultar. Hettar vísti seg seinni ikki at rigga grunda á at økið var ikki íligið(fest/sett seg). Har við er plásstørvurin voksin skjótari enn ætla.<br>Grunda á stóran tørv á gravarplássum verður neyðugt at fáa onkrar av sparingunum inn aftur í verkætlanina.<br>Talan er um spunslveggir ið eru tilætla at halda økini inntakt. Hettar kann gera, at vit skjótrari kunnu grava í feltini soleiðis at tey ikki detta/fella saman tá ið grivið verður í økini.<br>Sparingin var áljóðandi 1.080.540,- kr + mvg. Í uppruna tilboðinum. Mælt verður til at leggja 6% prísvøkstur á tilboði, ið gevur 1.145.372,40 kr uttan mvg. Samlaða játtani verður **við 6,25 % mvg 1.216.958.18 kr.**<br>Sparingin sæst undir pos.2.11 í uppskotinum – møguligar sparingar.<br>Á tekningum síggjast hvar spunslvegggirnir eru staðsettir fyri at fyribyrgja at økini fella saman.<br>Vit hava seinastu tíðina roynt at gjørt ymisk økir til gravarpláss fyri at nøkta tørvin. Veruleikin er at vit hava bert pláss til 10 dupultgravir og nakrar fáar einkult gravir inni í millum verandi gravarpláss. Metingin árliga er at 18-20 fólk fara foldum frá um árið í Fuglafirði. |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Bráðfengis tørvur á gravarplássum |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Grundarlag | • Samráðingar skjøl<br>• Tekningar<br>• Mynd av gravarplássøkið – víðkan | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | X | |
| | Umsitingarligar | X | |
| Tilmæli | Tekniski leiðarin mælir til at fáa spunslveggir inn aftur í verkætlanina. | | |
| Dagf | 19.01.2026 | | |

**Tekniska nevnd 21. januar 2026:**

Tekniska nevnd tók undir við tilmælinum og beinir málið víðari til Fíggjarnevndina og Býráðið til endaliga avgerð.

3

**Fíggjarnevndin 22. januar 2026:**
Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum frá teknisku nevnd.

**Býráðið 29. januar 2026:**
Mælt verður til, at eykajáttanin verður fíggjað av innistandandi.
Uppskotið var einmælt samtykt 9/0

## 2/26
## 25/00242-1 Løgtingslóg um integratión - Hvat merkir hettar fyri Fuglafjarðar Kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 07.04.2025 | 4/25 |
| 2 Sosiala nevnd | 14.01.2026 | 2/26 |
| 3 Fíggjarnevndin | 22.01.2026 | 5/26 |
| 4 Býráðið | 29.01.2026 | 2/26 |

### Tilráðing

| Til viðgerðar í | Sosiala nevnd, fíggjarnevndini og býráðnum |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Í desember 2024 samtykti løgtingi nýggju Integratiónslógina. Lógin staðfestir, at tað integratiónsuppgávan, sum fyrr hevur veri ein landsuppgáva, nú er deild ímillum land og kommunur.<br><br>Lógarteksturin er lagdur við sum dokument, har tað sum viðvíkur kommununum er markera við gulum.<br><br>Sambært nýggju lóggávuni skal kommunan í seinasta lagi 1. juli 2026 hava ein integratiónssamsipara (Kommunurnar kunnu velja, um hettar skal gerast í samstarvi við aðrar kommunur.<br><br>Integratiónssamskiparin hjá kommununi skal:<br>• Ráðgeva kommununi um integration<br>• Kunna tilflytaran um tilboðini í kommununi ella kommunala økinum (Skipa fyri kunnandi fundum)<br>• Arbeiða við integratiónsfremjandi tiltøkum<br>• Halda eyga við avbjóðingunum á integratiónsøkinum, so hesar vera loystar skjótast til ber.<br><br>Kunnandi fundir:<br>• Endamálið er at veita tilflytarum grundleggjandi vitan um teirra rættindi, skyldur, almennar tænastur og møguleikar í lokalsamfelagnum<br>• Eru serliga ætlaðir til at taka ímóti og stuðla nýkomnum tlflytarum, soleiðis at teir skjótari kunnu gerast ein partur av føroyska samfelagnum.<br>• Málbólkur:<br>Allir nýkomnir tilflytarar, sum eru fevndir av føroysku |

4

| | |
|---|---|
| | integratiónslógini (persónar við arbeiðsgrundaðum uppihaldsloyvi, familjusamanføring og flóttar<br>• Kommunal ábyrgd<br>Regluligir kunnandi fundir skjótast gjørligt eftir at nýggir tilflytarar koma til kommununa. (Skal gerast í samstarvið við integratiónsmynduleikan)<br>• Kunning sum skal veitast<br>o greið, samanhangandi og viðkomandi kunning um: rættindi og skyldur, heilsutænastur, útbúgving, almannatrygd, skattaskyldu, valrætt og aðrar almennar tænastur o.a.<br>o Lokalar tænastur og tilboð – skúlar, dagstovnar, arbeiðsvegleiðing, málskeið, heilsutænastur, neyðhjálpartænastur<br>o Integratiónsfremjandi tiltøk, mentorskipanir, málsligan stuðul o.a.<br>• Innleiðing til lokalsamfelagið<br>o Sosial netverk og feløg í nærumhvørvinum (ítróttarfeløg, mentanartiltøk, sjálvboðnir felagsskapir)<br>o Innleiðing til siðir, vanar, sosialar normar og mentanarligar siðvenjur á staðnum<br><br>Integratiónsfremjandi tiltøk skulu:<br>• Stuðla tilflytarum og fólkum við tilflytarabakgrund at gerast virknir luttakarar í føroyska samfelagnum<br>• Fremja eitt samskiftandi og lærandi umhvørvi millum tilflytarar og føroyskar borgarar<br>• Styrkja tvørmentanarligan kunnleika, virðing fyri fjølbroytni og sosiala inkludering í samfelagnum<br><br>Kommunan skal leggja serligan dent á integratión hjá børnum og ungum, og virkin skipa fyri tiltøkum í útbúgvingarstovnum og dagstovnum, sum samsvara trivnaðarætlanini. Herundir:<br>• Málslig tiltøk, sum stuðla børnum at læra føroyskt<br>• Felagsskapir og spæli-aktivitetir, sum stimbra sosialar relatiónir millum børn við ymiskum bakgrundum<br>• Familjuvegleiðingar, sum hjálpa tilflytarafamiljum at fóta sær í samfelagnum<br><br>Málið verður í fyrsta umfari lagt fyri Sosialu nevnd til kunningar. Umsitingin arbeiðir við at greina, hvussu Fuglafjarðar Kommuna kann loysa nýggju uppgávurnar sum eru lagdar á kommununa, og hvussu starvið skal normerast. Málið kemur fyri aftur, tá ið hettar er gjørt. Ein evt. Nýggj setan skal gerast í seinasta lagið 1. januar 2026<br><br>**14. januar 2026** |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

<table>
<tr><td></td><td colspan="3">Hjálagt er uppskot um eina samstarvsavtalu millum Fuglafjarðar kommunu, Eysturkommunu, Klaksvíkar kommunu, Kunoyar kommunu, Hvannasunds kommunu, Viðareiðis kommunu og Fugloyar kommunu um felags integratiónssamskipara fyri eysturøkið.<br><br>Samlaða árliga útreiðslan verður mett til 660.000 kr. Skotið verður upp, at útreiðslan verður deild lutfalsliga millum samstarvskommunurnar í mun til fólkatalið pr. 1. Januar árið frammanundan. Í so fall vil árliga útreiðslan hjá Fuglafjarðar kommunu verða 69.360 kr.<br><br>Hjálagda samstarvsavtala er fyrsta uppskot. Sosiala deild hevur gjørt onkrar viðmerkingar, serliga til §7 og §8. Viðmerkingarnar eru tiknar til eftirtektar, men nýggja avtalan er ikki komin enn.<br><br>Sum sæst av málslýsingini, skulu kommunurnar seinast 1. juli 26 seta ein integratiónssamskipara. Arbeiðsuppgávan er tó løgd út á kommunurnar pr. 1. Januar 2026. Tí verður skotið upp, at setan av integratiónssamskipara verður sett í verk sum skjótast.</td></tr>
<tr><td>Orsøk til at málið verður viðgjørt</td><td colspan="3">Nýggj løgtingslóg um integratión er samtykt í desember 2024 sum áleggur kommununi fleiri ymiskar uppgávur.</td></tr>
<tr><td>Grundarlag</td><td colspan="3">• Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>• Møgulig fylgiskjøl</td></tr>
<tr><td colspan="4">Viðgerð</td></tr>
<tr><td rowspan="3">Tekstur íð lýsir loysn</td><td>Avleiðingar</td><td>Stuttíðar</td><td>Langtíðar</td></tr>
<tr><td>Fíggjarligar</td><td></td><td>x</td></tr>
<tr><td>Umsitingarligar</td><td></td><td></td></tr>
<tr><td>Tilmæli</td><td colspan="3">07.04.2025<br>Mælt verður til, at Sosiala nevnd í fyrsta umfarið tekur kunningina um nýggju integratiónslógina til eftirtektar. Fyrisitingin arbeiðir við einum uppskotið um, hvussu arbeiðið kann skipast. Málið kemur fyri aftur, tá ið hettar arbeiðið er gjørd.<br><br>14.01.2026<br>Mælt verður til, at sosiala nevnd tekur støðu til viðhefta uppskotið til eina samstarvsavtalu áðrenn málið verður sent víðari til fíggjarnevndina til viðgerðar.</td></tr>
<tr><td>Dagf</td><td colspan="3">02.04.2025 – 12.01.2026</td></tr>
</table>

**Sosiala nevnd 07. april 2025:**
Sosiala nevnd tók kunningina til eftirtektar.

**Sosiala nevnd 14. januar 2026:**
Sosiala nevnd tekur undir við samstarvsavgtaluni viðv. Integratiónssamskipara. Sosiala nevnd ynskir, at starvið verður lýst leyst skjótast gjørligt.

**Fíggjarnevndin 22. januar 2026:**
Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum og mælir býráðnum til, at góðkenna samstarvsavtaluna.

**Býráðið 29. januar 2026:**
Tilmælið um samstarvsavtaluna bleiv einmælt samtykt 9/0

7

## 3/26
## 25/00501-2 Umsókn frá Vónini um útiøki til 200 bingjur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 13.10.2025 | 25/25 |
| 2 Vinnu- og havnanevndin | 17.11.2025 | 29/25 |
| 3 Fíggjarnevndin | 20.11.2025 | 71/25 |
| 4 Býráðið | 29.01.2026 | 3/26 |
| 5 Vinnu- og havnanevndin | 11.12.2025 | 34/25 |
| 6 Fíggjarnevndin | 27.01.2026 | 9/26 |
| 7 Býráðið | | |

### Tilráðing

| Til viðgerðar í | Vinnu- og Havnanevndini, Fíggjarnevndini og Býráðnum |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | P/F Vónin hevur søkt Fuglafjarðar kommunu um at leiga lendi svarandi til 2.100 m$^2$ meir enn teir hava avtalu um frammaundan. Her er talan um útiøki sum skal nýtast, at økja um útigoysmlu av bingjum frá 20 til 200 bingjur.<br><br>Sum er hevur Vónin avtalu um útiøki sum gongur fram til 2049.<br><br>Í ískoyisavtaluni frá mai 2024 verður lagt upp til at samráðingar skulu vera um endaliga loysn av leigu lendi har P/F Vónin fær tillutað í minsta lagi 1.000 m$^2$ afturat til «trolhotel».<br><br>Á sama øki hevur SEV eina umsókn inni um at byggja eina koblingsstøð, í samband við elektrifisering av orkunýtsluni hjá Havsbrún.<br><br>**Til fundin í Vinnu- og Havnanevndini 17.11.2025**<br>Fyrisitingin hjá kommununi hevur haft fund við SEV um staðseting av koblingsstøð. Niðurstøðan á tí fundinum er at tað ikki er átrokandi hjá SEV at koblingsstøðin er á sjálvum havnalagnum, men skal verða nærhendis stóru orkubrúkarunum.<br><br>Fyri ikki at forða fyri framtíðar útbyggingum og yvirhøvur hava lætta atgongd til økið er møguligt at seta veg av í einum møguligum komandi leiguøki uttanfyri Vónina. |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

<table>
<tr><td></td><td colspan="3">Til fundin í Vinnu- og havnanevndini 11.12.2025<br>Sáttmáli við treytunum samtyktar í Vinnu- og havnanevndini 17.11.2025 eru lagdar fyri P/F Vónina. Vónin tekur ikki undir við leigugjaldinum fyri bingjur tí:<br>• Hetta ikki fyrr hevur verið aktuelt<br>• At aðrir aktørar ikki gjalda fyri hetta<br>• At hetta er óforeiniligt við ein skynsaman rakstur hjá deildini í Fuglafirði<br><br>Tí ynskja teir at málið verður lagt fyri aftur Vinnu- og havnanevnd og fíggjarnevnd.<br><br>Til fund í fíggjarnevndini 27. Januar 2026<br>Umsitingin hjá Fuglafjarðar kommunu og Vónin eru komin ásamt um sáttmála, sum er í tráð við samtyktirnar frá Vinnu- og havnanevndini.</td></tr>
<tr><td>Orsøk til at málið verður viðgjørt</td><td colspan="3">Mál um leigu av lendi á havnalagnum, skal viðgerast í Vinnu- og havnanevndini, fíggjarnevndini og býráðnum.</td></tr>
<tr><td>Grundarlag</td><td colspan="3">Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>• Kommunustýrislógin og kommunustýrisskipanin fyri Fuglafjarðar kommunu<br>Møgulig fylgiskjøl<br>• Umsókn um loyvi til 200 bingjur í útigoymslu – Vónin (teldupostur)<br>• VON_K19_C04.01_N01 (Umsóknin)<br>• FK j. nr. 19_00121_1_Leigusáttmáli fyri matr. nr. 239ao, Fug...(upprunaligi sáttmálin um lendi til bygningin)<br>• Vónin leigusáttmáli uttanumøki á Enninum 2019.pdf<br>• ~ 23_00301-20 Undirskriva ískoyti til leiguavtalu millum Pf ...<br>• Fundarfrágreiðing millum SEV og Fuglafjarðar kommunu<br>• Tekning av møguligum leiguøki<br>• Leiguavtala lendi 2.100 fermetur - Vónin og Fuglafjarðar kom...</td></tr>
<tr><td colspan="4" align="center">Viðgerð</td></tr>
<tr><td rowspan="3">Tekstur ið lýsir loysn</td><td>Avleiðingar</td><td>Stuttíðar</td><td>Langtíðar</td></tr>
<tr><td>Fíggjarligar</td><td></td><td></td></tr>
<tr><td>Umsitingarligar</td><td></td><td></td></tr>
<tr><td>Tilmæli</td><td colspan="3">Mælt verður til at Vinnu- og havnanevndin viðgerð hvussu farast skal víðari við málinum.<br><br>Til fundin í Vinnu- og Havnanevndini 17.11.2025</td></tr>
</table>

| | |
|---|---|
| | Mælt verður til at Vinnu- og havnanevndin tekur støðu til um leiguavtala verður gjørd við P/F Vónina um um økið á 2.100 $m^2$ uttanfyri bygningin minus 364 $m^2$ til veg, íalt 1.736 $m^2$. Harafturat skal støða takast til áramál og leigukostnað.<br><br>**Til fundin í Vinnu- og havnanevndini 11.12.2025**<br>Vinnu- og havnanevndin skal taka støðu til um broytingar skulu gerast í leigukostnaðinum, í mun til samtyktina 17.11.2025<br><br>**Til fund í fíggjarnevndini 27. Januar 2026**<br>Mælt verður til at fíggjarnevndin tekur undir við uppskotinum til leiguavtalu millum P/F Vónin og Fuglafjarðarkommunu. |
| Dagf | 07.10.2025<br>12.11.2025<br>27. januar 2026 |



**Vinnu- og havnanevndin 13. oktober 2025:**
Vinnu- og Havnanevndin mælir til, at støðutakan til umsóknina bíðar inntil ein heildarloysn er funni á økinum og mælir fyrisitingini, at arbeiða víðari við málinum.

**Vinnu- og havnanevndin 17. november 2025:**
Vinnu- og havnanevndin tekur undir við at Vónin far leigað 2.100 $m^2$, við hesum treytum:

- Kommunan skal hava atkomurætt út ígjøgnum økið
- Gjaldast skal leigugjald fyri lendi pluss leigugjald fyri bingjur, sambært gjaldsskránni hjá Fuglafjarðar havn.
- Talan verður um ein 10 ára sáttmála.
- Vónin skal viðlíkahalda økið í sáttmálaskeiðnum og lata tað aftur í sama standi, sum tá leigumálið verður gjørt.

**Fíggjarnevndin 20. november 2025:**
Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum frá Vinnu- og havnanevndini.

**Vinnu- og havnanevndin 11. december 2025:**
Vinnu- og havnanevdin vísir á í mun til viðmerkingarnar hjá Vónini, at aðrar fyritøkur á havnalagnum ikki hava sama virksemi við bingjum, sum Vónin og tí kann ikki samanberast

við aðrar fyritøkur á havnalagnum. Harafturat gjalda aðrar fyritøkur á havnalagnum fyri vørur sum fara yvir bryggjukantin.
Tí heldur Vinnu- og havnanevndin fast við at leigugjaldið skal fevna um bæði lendisleigu og bingjuleigu.

**Fíggjarnevndin 27. januar 2026:**
Fíggjarnevndin tekur undir við uppskotinum til leigusáttmála sum fyriliggur. Tó skal sáttmálin gjøgnumgangast við røttum dagfestingum.

**Býráðið 29. januar 2026:**
Býráðið tók einmælt undir við uppskotinum til leiguattmála sum fyriliggur.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**5/26**
**26/00017-3 Avtala um inntríningarrætt í avtaluna millum Fuglafjarðar kommunu og Ennibryggjuna**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.01.2026 | 1/26 |
| 2 Býráðið | 29.01.2026 | 5/26 |
| 3 Fíggjarnevndin | 27.01.2026 | 10/26 |
| 4 Býráðið | | |

**Tilráðing**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Til viðgerðar í | Fíggjarnevndini og býráðnum | | |
| Stutt lýsing av málinum | Í samband við lánsfíggjing hevur Føroya Banki sett, sum treyt yvir fyri P/F Ennibryggjuni, at bankin fær inntríningarrætt í avtaluna um so er at lánitreytirnar verða mishildnar. Um so er at bankin inntraðkar í sáttmálan kann han avhenda einstaklingi ella felag bryggjuna sambært §5 í sáttmálanum. Har er ásett at hetta skal góðkennast av býráðnum.<br><br>**Til fund í Fíggjarnevndini 27. januar 2026**<br>Spurningur er komin frá P/F Ennibryggjuni um møguleika at broyta gildistíðina fyri leigusáttmálan soleiðis at tey 15 árini byria frá nú av og ikki juni 2024, tá sáttmálin varð góðkendur av býráðnum. | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Neyðugt er at gera avtalu um inntríningarrætt í samband við veðseting og skal hetta viðgerast í fíggjarnevnd og býráðnum. | | |
| Grundarlag | **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt**<br>• Kommunustýrislógin og kommunustýrisskipanin fyri Fuglafjarðar kommunu.<br>**Møgulig fylgiskjøl**<br>• Ennibryggja -teldupostur frá advokatinum hjá Ennibryggjuni<br>• Undirskrivadur átekning á sáttmáli um Ennibryggjuna.pdf<br>• Undirskrivadur sáttmáli um Ennibryggjuna.pdf | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur ið lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | | |
| | Umsitingarligar | | |

14

| | |
|---|---|
| Tilmæli | Málið er um hvussu felagið Ennibryggjan fíggjar íløguna í bryggjuna og veðseting í hesum viðfangi. Tí hevur hetta ikki ávirkan á sjálvan sáttmálan millum Fuglafjarðar kommunu og Ennibryggjunia, tá ásetingarar í hesum sáttmálanum ikki verða broyttar. Tí verður mælt til at fíggjarnevndin og býráðið góðkenna avtalu um inntríningarrætt millum Føroya Banka, Ennibryggjuna og Fuglafjarðar kommunu.<br><br>**Tilmæli til fíggjarnevndina 27. januar 2026**<br>Við tað at niðurgjaldstíðin(avslátturin frá kommununi) av íløguni er baserað uppá eitt 15 ára tíðarskeið, verður mælt til at gildistíðin verður broytt, at galda frá 1. februar 2026 til 31. januar 2041. |
| Dagf | 12.01.2026 |

**Fíggjarnevndin 22. januar 2026:**
Fíggjarnevndin tók einmælt undir við tilmælinum um inntríningarrætt.

**Fíggjarnevndin 27. januar 2026:**
Fíggjarnevndin tók einmælt undir við tilmælinum.



**Býráðið 29. januar 2026:**
Býráðið samtykti einmælt tilmælið um inntríningarrætt

Fundurin lokin kl. 20.15

Dávur Juul

Ólavur Larsen

Eyðun á Lakjuni

Eivin Breiðaskarð

Sonni á Horni

Jóan Pauli Olsen

Jastrid á Dalbø

Ørvar Jacobsen

Kristian Martin Petersen



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo